# ítróttur

Nr. 240 • mikudagur • 15. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo



*Jónsvein Herup Olsen varð fremstur av veteranunum. Her sæst hann saman við Óla Olsen og Tummas Joensen, sum gjørdust ávíkast nummar tvey og trý*

# Runnu í Havn

Leygardagin skipaði Bragdið og Tryggingarfelagið Føroyar fyri 3. umfari av TF Vetrarkappingini í Havn. Í alt 43 luttakarar luttóku í kappingini, tey vaksnu runnu 12 km og børnini 4 km. Kappingin var væleydnað við góðari undirtøku og líkindini at renna vóru hampuliga góð, tó við nakað av vindi.

TF Vetrarkappingin er nýggj kapping, sum Frælsur Ítróttur Føroya stendur fyri og Tryggingarfelagið Føroyar stuðlar.

Talan er um eina vetrarkapping í seks umførum. Fyrsta umfar var á Toftum, annað umfar í Klaksvík og 3. umfar var í Havn leygardagin. Trý tey seinastu umførini verða í januar, februar og mars næsta ár.

### Úrslitini í einstøku bólkunum vóru hesi

**Dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Álvur F. Christiansen | Treysti | 14.34 |
| 2 Jan Elmar Sørensen | Treysti | 14.38 |
| 3 Rúni Seloy | Bragdið | 16.25 |

**Gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Bjørk Herup Olsen | Bragdið | 16.27 |
| 2 Rannvá Djurholm | Bragdið | 17.35 |
| 3 Rebekka Fuglø | Treysti | 19.12 |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Katrin Olsen | Tórshavn | 55.51 |
| 2 Hanna Maria Niclassen | Frælsi | 82.02 |

**Mansunglingar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Arnfinnur Nesá | Gøta | 50.29 |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Hallur Holm | Bragdið | 42.48 |
| 2 Guttorm Sørensen | Treysti | 42.49 |
| 3 Trygvi Hansen | Bragdið | 46.26 |

**Menn – veteranar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Jónsvein Herup Olsen | Bragdið | 47.03 |
| 2 Óli Olsen | Bragdið | 49.47 |
| 3 Tummas Joensen | 49.53 | |

## Nýggjur sáttmáli til Holst

Í Lyngby fegnast tey um, at tað hevur eydnast at fáa pappír upp á føroyska toppskjúttan í felagnum í enn tvey ár.

Christian Holst Lamhauge, sum hevur føroyska mammu, varð fyrr í heyst kosin sum ársins profilur í donsku 2. deild. Hann hevur síðani heystið 2003 verið sáttmálabundin at Lyngby, har hann í 44 dystum hevur skotið 32 mál. Higartil hetta kappingarárið hevur talan verið um 17 dystir og 16 mál, so einki er at ivast í, at hetta er ein leikari, sum tey í Lyngby hava verið fegin um.

**-jm**

## Til Skotlands uttan Rúna

Føroyska manslandsliðið í flogbólti fer hósdagin til Skotlands, har teir skulu leika tríggjar dystir. Allir dystirnir verða móti Skotlandi, og verða teir leiktir í Glasgow fríggja-, leygar- og sunnudagin.

Seinasta árið hava Føroyar tvær ferðir leikt móti Skotlandi, og hevur talan tá báðu ferðirnar verið um teprar 3-2 sigrar til okkara, so alt røkist fyri nøkrum góðum og spennandi venjingardystum. Tað er tó greitt, at føroyska liðið er nakað skert. Rúni Weihe, sum uttan iva er ein av týdningarmestu leikarunum á liðnum, fær ikki verið við hesaferð vegna lesna.

**-jm**

## 350.000 kr. til graslíki



Fíggjarnevndin hjá Løgtinginum legði mánadagin fram álit um ymsar broytingar í fíggjarlógini fyri 2005. Ein av hesum broytingum er eitt tilmæli, at nevndin mælir til, at 350 tkr. eyka verða settar av undir postinum, ítróttaranlegg.

Í viðmerkingunum til tilmælið verður sagt, at upphæddin er ætla til smáar spælivøllir kring landið. Hetta er ein ætlan, sum eisini er fevnd av stuðuli frá UEFA, og er talan um sonevndar minivallir. Eitt nú sum tann á Hamarinum á Argjum, sum varð tikin í nýtslu í seinasta mánaði.

**-jm**